# Laudrup vil í Champions League

Danski fótbóltsvenjarin Michael Laudrup gevst sum venjari í spanska felagnum Getafe, og hann vil nú starvast fyri eitt felag, sum skal spæla við í Champions League næsta kappingarár. Tað siga spanskir fjølmiðlar. Í farnu viku vóru venjarar settir í Valencia og Benfica, men Laudrup gjørdist ikki venjari har. Sambært sponskum fjølmiðlum eru feløgini CSKA Moskva, Panathinaikos og Galatasary upp á tal sum nýggir arbeiðsgevarar hjá Laudrup.



# Amager nærri uppflytingini

Talan var um rimmar túr, tá ið Fremad Amager við Toda Jónsson sum nevndarformanni og trimum føroyingum í hópinum – Hans Jørgensen, Erling Jacobsen og Rókur Jespersen – seinnapartin vann 5-1 í Værløse. Sigurin gjørdist eyka søtur, tá ið Børnshøj, sum er á triðja plássi, á heimavølli tapti 3-0 á heimavølli ímóti Greve. Oddaliðið í 2. deild eystur, Roskilde, hevur ikki spælt í dag. Roskilde hevur 55 stig fyri 25 dystir, Fremad Amager hevur 54 stig fyri 26 dystir, og Brønshøj hevur 48 stig fyri 26 dystir.

# Suðuroy hevur mist flogið

**Eftir sannførandi fyrstu umfør hjá teimum báðum feløgunum í Suðuroy, eru tað nú AB og 07 Vestur, sum í summarveðrinum hava mesta undanvindin**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað er um at venda í toppinum í næstbestu deildini. Í fyrstu umførunum vóru tað tey bæði feløgini í Suðuroy, sum vóru mest sannførandi og høvdu størstu úrtøkuna. Nú tykist tað sum um, at tað eru 07 Vestur og AB, sum gongdin er best hjá, og munurin frá VB/Sumba og aftur til hesi bæði er tóðnaður til eitt stig.

Leygardagin fór VB/Sumba fyri fyrstu ferð í ár av vøllinum uttan at hava vunnið stig. Eitt sindur óvæntað var tað, at tapið skuldi verða í Leirvík, har næstbestu víkingarnir vóru ov boysnir hjá oddaliðnum.

Talan var um undirhaldandi og tætta uppgerð við hampuligari leikferð. Einsamalla málið skoraði Víkingur í síðstu løtu. Málskjúttin Meinhard Joensen var rættiliga í brennideplinum. Eftri at hann var skiftur inn, sá hann gult, tí skiftingin ikki var fráboðað til dómaran. Og so skoraði hann sigursmálið. Martin Olsen legði frísparkssending fram úr høgru, Bjarni Johansen í VB/Sumba málinum hálvbjargaði stútaranum á stólpan, og tá ið bólturin fór tvørtur við málstrikuni, var Meinhard Joensen fyrstur á.

Onkrir aðrir málmøguleikar vóru. Tann størsta misnýtti heimaliðið, tá ið Bjarni Johansen bjargaði brotssparksroynd í 1. hálvleiki.

TB var á odda tvær ferðir, men tað endaði 2-2 á Sevmýri ímóti teimum næstbestu hjá HB, sum stríddust væl í hampuliga væl spældum dysti við høgari leikferð.

Málmøguleikarnir vóru ikki so nógvir, og trý av fýra málum vórðu skorað í sambandi við deyðbóltsstøður. Johan Eyvind Restorff Mouritsen legði heimaliðið framum miðskeiðis í 1. hálvleiki við brotssparki, sum varð dømt eftir at Dan Mortensen varð feldur dygst innanfyri brotsteigarmarkið.

Ingvard Vang javnaði til 1-1, tá ið tað restaðu fýra minuttir av 1. hálvleiki. Hann setti bóltin framvið málverjanum, eftir at Jóan Petur Holm eitt sindur úr høgru hevði stungið bóltin fram um verjuna.

Miðskeiðis í 2. hálvleiki legði Óli Johannesen TB framum aftur við dundur skoti av brotsteigarmarkinum. Eftir TB horna varpaði HB bóltin út frá, og har stóð veteranurin og smekkaði til.

Fimm minuttir fyri leiklok javnaði Janus M. Joensen við brotssparki til 2-2, sum gjørdist úrslitið. Dómarin í bríkslaði, tí Thomas Hans Rubeksen varð togaður niður, tá ið HB fríspark varð lagt inn fyri úr vinstru.



*Argjamenn hava undanvind í løtuni. Um vikuskiftið gjørdist talan um tryggan sigur á KÍ*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

07 Vestur og AB vunnu trivaligar heimasigrar ímóti teimum næstbestu hjá ávikavíst NSÍ og KÍ. 07 Vestur legði fyri sum ódnarveður ímóti á pappírinum hampuliga væl mannaðum NSÍ liði, sum mundi kenna beinini púra sligin undan sær. Jovan Panic skoraði tvey framúr mál úr støðum uttanfyri brotsteigin.

Sama søgan var á Argjum, har KÍ ikki var so væl mannað, sum næstbestu klaksvíkingarnir onkra ferðina fyrr í ár hava verið. Einsamalla KÍ málið skoraði 17 ára gamli Rani Jacobsen. Hetta var fyrsta ferðin, at hann skoraði í 1. deild.

Lyklauppgerðina í Streymnesi vann heimaliðið sannførandi á B68, sum nú er greitt niðast og seks stig aftanfyri EB/Streymi, ið er á 8. plássi. Merkisvert var tað í Streymnesi, at Marcell Balok, sum leingi hevur verið skaddur, aftur hesa ferð var tvífaldur málskjútti. Hann hevur leingi verið skaddur, men man við málunum á næstbesta liðnum seinastu ferðirnar ikki vera langt burtur frá besta liðnum.

# Champions League var feit forrætning fyri Moskva

**UEFA-Cup, Íshokki-HM, Melodi Grand Prix, og ein væleydnað Champions League finala. Russar hava nógv at smílast um í hesum døgum**

FÓTBÓLTUR
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

Flestu russar ganga við einum stórum smíli í hesum døgum. Mikukvøldið 14. Mai vann Zenit Sankta Pætursborg UEFA-cup kappingini, har teir vístu seran góðan fótbólt í allari kappingini. Sunnudagin 18. Mai vann Russland HM í íshokki í sjálvum upprunalandinum hjá íshokkiítróttini, Kanada. Aftaná umdyst vann Russland 5-4 á vertstjóðini, Kanada. Um vikuskiftið vann Russland Melodi Grand Prix. 3 ymisk ting, sum russar munnu fegnast stórligaum. Fíggjarliga munnu teir smírast mest um Champions League finaluna millum Chelsea og Manchester United, sum var spæld á Luzniki Leikvøllinum í Moskva.

## Nógvir pengar

847 miljónir rublar fekk Luzniki Leikvøllurin frá býarstýrinum í Moskva til allar fyrireikingarnar, sum skuldu gerast. Í okkara pengi svarar tað til uml. 170 miljónir kr. Ensktmælta tíðindablaðið, Moscow News hevur gjørt nógv burturúr øllum peninginum, sum moskovittar hava vunnið burtur úr Champions League-finaluni. Mett verður, at gjøgnumsnitts-fótbóltsfjepparin hevur brúkt 1.330 amerikanskar dollarar uppá túrin til Moskva, haraftrat koma 160 dollarar fyri flutning, og 240 dollarar uppá mat og drekka. Simon Chadwick frá lærda háskúlanum í Coventry í Onglandi metir, at Moskva, sum vertsbýur hevur vunnið 69 miljónir dollarar, uml. 300 miljónir dollarar uppá hetta stóra einstaka tiltakið. 413 miljónir dollarar eru hjá teimum ymisku pørtunum at vinna uppá finaluna. Chelsea og Manchester United, og tá serliga vinnarnir úr United fáa eisini sín stóra part av tí lagkøkuni. Manchester United fær heilar 167 miljónir dollarar burturúr stóra ævintýrinum. Meðan Chelsea má ”noyðast” við 59 miljónir dollarar. So neyðardýrið, John Terry kostaði Chelsea 108 miljónir dollars. Simon Chadwick metir, at tað er bara ein einstøk ítróttarhending, sum verður hildin á einum ávísum degi árliga, sum kann kappast við evropeisku Champions League finaluna í fótbólti. Talan er um ”Superbowl”, sum er stóri finaludagurin í amerikonskum fótbólti. Stóru Champions League-sponsorarnir, Heineken, Sony og MasterCard hava goldið 13 miljónir dollars fyri at verða nevndir og prentaðir í øllum tilfarinum, sum er framleitt og prentað í sambandi við tað stóra tiltakið í Moskva.

## Gagnnýttu støðuna

Tó er ikki frítt, at summir moskivittar hava útnyttað tað stóru mongdina av fótbóltsfjepparum, sum eru komnir til Moskva. Ein hýruvagnstúrur frá Reyða Torginum til gongugøtuna, Arbat, sum vanliga kostar 150 rublar, kostaði 1.000 rublar hjá summum hýruvagnsførarum. Summi gistingarhús smurdu eisini tjúkt uppá. Kømur, sum vanliga kosta 7.500 rublar vóru bíløgd finaludagin fyri heilar 96.000 rublar. Summi gistingarhús vóru enntá so grísk, at tey duppultbókaðu øll kømurini fyri ikki at ”missa” nakað í samband við avlýstar bókingar. Trupulleikin var bara, at tað endaði við, at nógvir fótbóltsfjepparar høvdu eitt bíleggingarprógv tey høvdu goldið fyri, men einki kamar at sova í, orsaka av duppultu bíleggingunum. Altjóða fyritøkur, sum satsa stórt uppá russiska marknaðin løgdu nógv fyri, fyri at bjóða møguligum komandi samstarvsfólkum til Champions League-dystin. Bilframleiðarin Ford hevði 880 gestir til dystin, og Vodafone hevði góðar 400 gestir. 25 føroyingar vóru eisini til dystin, og teir løgdu heldur ikki so lítið eftir sær!